Grát, mítt elskaða land

Forlagið Sprotin hevur givið út skaldsøguna Grát, mítt elskaða land eftir Alan Paton

ÚTGÁVA
Turið Kjølbro

Skaldsøgan Grát, mítt elskaða land lýsir felags skuld og vinalag, sum hevjar seg upp um allar fordómar um suðurafrikanaran. Stephen Kumalo, ein aldrandi Zulu prestur, fer úr heimbygdini til Johannesburg og fær at vita, at einasti sonur hansara hevur myrt James Jarvis, ið er einasti sonur ein hvítan mann. Sorgartilburðurin knýtir menninar saman, og teir fara undir arbeiðið at gera enda á skilaloysinum.

Suðurafrikanski høvundurin Alan Paton, sum livdi frá 1903 til 1988, stovnaði Suðurafrikanska Frælsisflokkin og var formaður í honum frá 1953, til flokkurin varð bannlýstur í 1968 við lógini um bann fyri politiskt uppíbland.

Flokkurin var í andstøðu til apartheit-politikkin og vísti á gongdar leiðir í suðurafrikanskum stjórnarpolitikki, sum ikki vóru grundaðar á rasistiskan hugburð.

Eftir kríggið gjørdi Alan Paton eina ferð til Evropa og Amerika at kanna fongsulsviðurskifti. Á hesari ferð skrivaði hann skaldsøguna Grát, mítt elskaða land - tær fyrstu síðurnar á einum hotellkamari í Tróndheimi og tær seinastu í San Fransisco. Bókin varð prentað í 1948.

Finnbogi Ísakson hevur týtt Grát, mítt elskaða land úr norskum. Skaldsøgan varð lisin upp í Útvarpi Føroya í 1988. Bókin fæst í bókabúðunum fyri 240 krónur.

Samráðingarnar slitnaðar

Føroya Pedagogfelag undrast yvir, at Fíggjarmálastýrið ger mun á lønarhækkingum fyri starvsbólkar

SAMRÁÐINGAR
Turið Kjølbro

Samráðingarnar millum Føroya Pedagogfelag øðrumegin og Fíggjarmálastýrið og Kommunalu Arbeiðsgevarafeløgini hinumegin eru nú lagdar upp til seming. Partarnir fóru undir samráðingar í farna mánaði, men koma nú ikki víðari. Orsøkin er, at lønarbatin, sum Fíggjarmálastýrið og kommunurnar vilja lata limunum hjá Pedagogfelagnum, er nógv lægri enn tað, sum ein stórur partur av teim alment løntu hava fingið í lønarhækking í ár. Felagið hevur ilt við at skilja, hví Fíggjarmálastýrið nú miðvíst er farið undir at gera mun á lønarhækkingum fyri starvsbólkar.

Sáttmálin hjá Føroya Pedagogfelag fór úr gildi 1. mars í ár. Seinast í mars fór felagið í verkfall í tveir dagar, tí ógreiðan um, hvønn felagið skuldi samráðast við, Fíggjarmálastýrið ella kommunurnar ikki varð avgreidd.

Fróðskaparrit komið

Trettan greinir, ið fara víða um í granskingarheiminum mynda Fróðskaparrit 48

ÚTGÁVA
Turið Kjølbro

Í Fróðskaparriti 48, sum júst er komið, eru hesa ferð trettan greinir, ið fara víða um innan føroyska granskingarheimin, fýra innan hugvísindi, ein innan læknavísindi og sjey innan náttúruvísindi.

Málfrøðingarnir Jógvan í Lon Jacobsen og Hjalmar P. Petersen hava skrivað hvør sína grein, tann fyrra er um Tjørnuvíksmál og hin seinna um samansett sagnorð.

Aftur hesa ferð hava doktaralesandi nýtt høvið til at lata ritinum greinir, skrivaðar sum liður í útbúgving teirra. Hetta er galdandi fyri Kirsten Brix við greinini Hans Andrias Djurhuus: Álvaleikur; Onnu Mariu Fosaa, ið gevur eitt yvirlit yvir føroysk plantusamfeløg; og Eilif Gaard og Petur Steingrund, ið viðgera nøringina hjá toskinum á landgrunninum.

August Wang og fólk afturat honum hava eina grein um leitan eftir ílegumøguleikum á útvaldum kromosomum hjá føroyskum sinnissjúklingum.

BioFar hevur seinastu árini havt fast pláss í Fróðskaparritum til avrik frá hesi stóru og týðandi verkætlan. Í 48. bók eru tvær greinir, har Jan Sørensen saman við øðrum listar kanningarstøðini frá BioFar 2 verkætlanini, og Tór Eilin Lein saman við øðrum hevur skrivað um títtleikan av dýra- og tarasløgunum á klettastrond.

Ingvar Svanberg viðger, hvussu snjófuglur verður brúktur til matna.

Í nógv ár hevur Jens-Kjeld Jensen arbeitt sum fuglaútstappari í Nólsoy, men hann hevur eisini onnur áhugamál. Í ritinum hevur hann eitt yvirlit yvir blómuflugur og loppur við myndum.

Maria Dam frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni hevur fylgt gongdini viðv. innihaldi av kyksilvuri í tvøsti og organokloridum í spiki.

Bergur Hanusson, djóralækni, hevur kannað sníkar í seyði og skrivað stóra grein við fitt av myndum av ymisku sníkunum.

Dorete Bloch, fil.dr., er ritstjóri á Fróðskaparriti. Fróðskaparrit 48 er 201 síður. Haldaragjaldið er 165 kr. um ári. Í leysasølu kostar ritið 195 kr. Mentunargrunnur Landsins gevur Fróðskaparrit út, og Bókamiðsølan hevur søluna um hendur.

Føroyingar flúgva sum ongantíð fyrr

Talið av ferðafólkum, sum hava ferðast um flogvøllin í Vágum, er voksið við 20% í mun til sama tíðarskeið í fjør

Yvirgangsatsóknirnar fyri kortum hava eftir øllum at døma ikki minka um hugin hjá føroyingum at ferðast loftvegis. Magni Arge, stjóri fyri Atlantic Airways, væntar tó meirútreiðslur við tíðini. Ein hækkan av ferðaseðlaprísum er eisini á veg

FLOGFERÐSLA
Heri á Rógvi

Yvirgangsatsóknirnar í farna mánað hava sett síni tungu spor á heimin. Menniskjaliga vanlukkan gjørdist øllum kunnugt ovurstór. Eisini partar av vinnulívinum komu at merkja sviðan av atsóknunum 11. september. Fólk, serliga ì Sambandsríkinum, settust aftur og byrjaðu at brúka alsamt minni av peningi, og hetta setti beinanvegin síni spor á búskapin. Ein rættilig flogræðsla byrjaði eisini at gera seg galdandi í Sambandsríkinum og aðrastaðni við. Hetta hevur higartil havt tær fylgjur, at fleiri flogfeløg hava verið noydd til at gera munandi skerjingar. Hópuppsagnir og eisini onkur húsagangur hava verið gerðandiskostur í fjølmiðlunum seinastu tíðina. Stjórnirnar bæði í Sambandsríkinum og í fleiri evropeiskum londum hava verið noyddar til at seta umfatandi búskaparlig átøk í verk fyri at bjarga teimum afturútsigldu flogfeløgunum.

Fleiri ferðandi

Føroyingar dámar óføra væl at ferðast loftvegis, og hetta merkist eisini á øllum brøgdum. Hóast atsóknirnar í Sambandsríkinum í farna mánað, so er hugurin hjá føroyingum at ferðast loftvegis ikki minkaður, men heldur tvørturímóti voksin – í øllum førum enn. Í september mánað í ár ferðaust 13.478 fólk um flogvøllin í Vágum. Sama tíðarskeið í fjør fóru 11.229 fólk um flogvøllin í Vágum. Hetta er ein vøkstur uppá 20%. Talan er um fólk, sum entin koma til ella fara frá flogvøllinum. Hetta merkir eitt nú, at ein oljuarbeiðari, sum kemur við flogfari úr einum øðrum landi og skal flúgvast út á riggin og aftur, munar rættiliga væl í hagtølunum.

Talið av fráferðum og komum er eisini voksið við 44 % sama tíðarskeið.

Hægri gjøld

Hóast flogfeløg kring allan heim taka umfatandi stig fyri at bjarga sær sjálvum, so verður tað væntandi ikki neyðugt hjá Atlantic Airways at fremja nøkur stórvegis átøk fyribils, veit stjórin, Magni Arge, at siga.

- Vit hava ikki merkt nakað stórvegis til hesa nýggju støðuna á okkara ferðafólkatali, sigur Magni Arge.

Atlantic Airways hevur seinastu árini víðkað almikið um teirra virksemi við eitt nú nýggjum farleiðum. Sambært stjóranum eru ongar ætlanir um at niðurleggja nakrar av hesum farleiðum.

- Vit vænta okkum nakrar dýrari tryggingar og strangari trygdarkrøv, sigur Magni Arge.

Hann sigur, at tað er torført at siga akkurát nær hetta kemur at merkjast. Mestir vera nýggju tryggingarkostnaðirnir at merkja skjótt. Her verður væntandi talan um øktar útreiðslur í millónaupphæddum. Strangari trygdarkrøvini verða væntandi ásett loypandi yvir eitt tíðarskeið, sigur Magni Arge. Hóast felagið hevur kunnað víst á yvirskot í nøkur ár, so kemur hetta framvegis ikki væl við. Ein fylgja av hesum verður eisini, at ferðaseðlakostnaðurin verður hækkaður við fimm prosentum. Bílígu ferðaseðlarnir ella kampagnu ferðaseðlarnir vera tó framvegis at fáa, heldur Magni Arge.

- Vit fara at hava tað torført við at planleggja í framtíðini, og vit mugu vera meira varnir, sigur Magni Arge at enda.

Atlantic Airways ætlar at hækka ferðaseðlaprísin við fimm prosentum. Eisini væntar stjórin hægri tryggingargjøld